# Nøvn

## Føðingar



*Hósdagin 3. februar fekk eg hesa fittu, lítlu systir, sum var 54 cm long og vigaði 4055 gr. Mamma og babba eita Anna Eiriksdóttir Simonsen og John Kári Midjord. Vit búgva í Keypmannahavn. Heilsan Bjarta*




*23. februar fingu Eyð-Britt Tjaldrastein, Sigmund Johanneson, Signabø, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 2210 gr.*

21. februar fingu Doris Bjarkhamar og Hjalmar Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3270 gr.

22. februar fingu Sarah Foghill og Jørleif Fornagarð, Kambsdalur, tvíburðar, gentur. Onnur var 47 cm long og vigaði 2535 gr, hin var 48 cm long og vigaði 2505 gr.

27. februar fingu Petra Sigurstein og Hávarður Fjallstein, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3940 gr.

1. mars fingu Andrea Sørensen og Karl Fríði Hansen, Tvøroyri, tvíburðar, gentu og drong. Dótturin var 49 cm long og vigaði 2710 gr. Sonurin 50 cm langur og vigaði 2820 gr.

3. mars fingu Borghild Simonsen og Robin Kjeld, Gøtugjógv, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3700 gr.

5. mars fingu Marjun Rubeksen og Brian Borgardal, Argjum eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

5. mars fingu Hellen og Sjúrður Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3490 gr.

8. mars fingu Guðbjørg Abrahamsen og Dávur Clementsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3350 gr.

5. mars fingu Ragna Gregersen og Hávardur Trúgvason, Strondum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

9. mars fingu Anja og Jóan Pauli Weihe, Sørvági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 2950 gr.



## TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda umsorgan og samkenslu, tá ið góða kona mín, mamma, vermamma og omma okkara

**Súsanna Malena Jacobsen**
**Sandvík**
**vanliga nevnd Samalena**

lá sjúk, andaðist og varð jarðað.

Tøkk til prest, kirkjutænarar og tykkum, ið skipaðu so væl fyri ervinum. Stóra tøkk fyri alla hjálp. Somuleiðis tøkk fyri blómur og peningagávur til kirkjuna í Sandvík.

***Vinarlig heilsan***
**Christian**
**Lena, Símun, Súsanna og Kristjan**

# Kjak

## Takk fyri, Helena!

HUXA mótmælti harðliga í móti »internet« skattinum, ið landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, innførdi fyrr í ár. Eitt drúgt orðaskifti birtist í millum javnaðarkvinnuna og HUXA, men kjakið var ikki til fánýtis.

### Kringvarpsgjald

Sjáldan elva ungmannafeløg til rembingar í politikki, men nú er at frøast um, at Helena Dam á Neystabø tók boðskapin hjá HUXA til eftirtektar. Í lesarabrævi til allar fjølmiðlarnar 08.03.2011 viðgongur hon, at "eg haldi ikki, at tað er rímiligt, at ein miðnámsskúlanæmingur, sum býr einsamallur, skal rinda kringvarpsgjald."

### Ungmannafeløg

Sum áður nevnt, so er tað at gleðast um, at ein virðismett landsstýriskvinna tekur atlit til okkum ungu. Tað er ikki bara ein sigur fyri HUXA, men fyri øll ungmannafeløgini. Vónandi gevur broytingin hjá Helenu Dam á Neystabø afturljóð í millum tykkum ungu, tí at við at vera partur av ungmannafelagi hevur tú møguleika fyri at ávirka gerandisdagin hjá tær og mær.

**Nevndin í HUXA**